## DAGSINS MEINING

# Oljan aftur á dagsskránna

Eftir ein steðg í oljuleiting og oljuvónum verður nú aftur varpað ljós á undirgrundina á landgrunninum, báðumegin markið. Risastóra oljufelagið ChevronTexaco fer fyrst í apríl mánað undir eina rættiliga avgerandi boring , skamt frá markinum. Og longu tveir mánaðir eftir tað, beint í kjalarvørrinum á hesi boringini, fer so ein annar oljurisi í aljóða oljuhøpi, Agip í gongd. Talan er um eina boring í føroyskum øki og eina í bretskum. Men fyri føroyingar og feløgini, sum leita eftir olju á okkara landgrunni hevur boringin í bretskum øki sera stóran týdning. Tí øll boring á Atlantsmótinum báðumegin markið er við til at geva nýggja vitan til alt økið og skal harvið betra um møguleikarnar at raka við oljukeldur í undirgrundini.

Texaco, nú ChevronTexaco er ein gamal kenningur í Føroyum. Felagið var millum fyrstu oljufeløgini, sum tíðliga í 90-unum fóru at vísa okkara landgrunni ans. Tað var við í boringini í Lopra og í flestu av kanningunum her. Felagið var eisini eitt tað fyrsta til at seta seg niður í Føroyum. Tað skuldi so ikki eydnast felagnum at fáa leitiloyvi í 2000 og varð endin eisini tann,.at Texaco tók seg úr tí føroyska økinum. Men trúgvin uppá Atlantsmótið var kortini so stór, at felagið ikki gav skarvin yvir. Tað satsaðI alt uppá at fáa tey bestu loyvini í 19. Útbjóðingarumfarinum í bretskum øki og fekk tey, so gott sum.

Hóast bert tvær oljukeldur framleiða á Atlantsmótinum millum Føroyar og Bretland eftir nærum 170 boringar, so hava fleiri av stóru oljufeløgunum ikki minst vónina til hetta stóra økið. Og tað er so komandi boringin hjá ChevronTexaco eitt gott dømi um. Borað verður longu í apríl og liggur boristaðIð miullum føroyska markið og verandi framleiðandi oljufeltini á bretskum øki, Foinaven og Schiehallion. Ikki so langt frá, inni á okkara egna landgrunni, er Agip farið at leggja síðstu hond á fyrireikingarnar til sína fyrstu boring her. Eisini Agip hevur verið virkið í økinum leingi og nú skal tað so til at vísa umverðini, um tað hevur gjørt sítt heimaarbeiðI betri enn onnur oljufeløg ella tað verður hepnari enn tey, sum hava roynt og einki ella ov lítið funnið.

Stórur áhugi og spenningur var í Føroyum , tá oljufeløgini fóru undir sínar fyrstu boringar. Helst vóru vónirnar ov stórar, tí hagtølini vísa, at tað skulu borast nógvir brunnar, áðrenn tú rakar í blett. Nú ChevronTexaco og Agip fara at bora hvør sínu megin markið og stutt frá verandi oljuframleiðandi keldum eigur tað so avgjørt at hava okkara stóra áhuga. Tí vil væl til og hava feløgini lúrt hini oljufeløgini, sum ikki raktu í blett, av og betri vita, hvar tey skulu seta borin í, so kann tað henda, at Føroyar innan nakrar fáar mánaðir eru vorðin oljutjóð ella eru komnar nógv nærri hesum máli.

Eitt oljufund í bretskum øki hevur so sanniliga eisini stóran týdning fyri okkum. Tað kann fáa oljufeløg, sum ikki eru virkin her í dag, at vísa eini komandi 2. Umfari á landgrunninum ans. Tað fer at kveitkja nýtt lív í vónirnar, sum hóast nógvar turrar brunnar, kortini ikki eru deyðar. Ein og leitað varð vestan fyri Hetland í nærum 20 ár, áðrenn fyrsta oljan sprændi, á sama hátt eiga vit at vísa tol, tó at vitanin og tøknin í dag er nógv betri enn fyrr, og tí hava vit alla orsøk til at halda, at eydnan fer at vera við okkum og feløgunum her arbeiða nógv skjótasri enn royndirnar hinumegin markið.

Nú seta vit øll vónirnar til ChevronTexaco og Agip.

**Sosialurin**

# Jan Müller á odda

**Sjúrður Skaale**



Jan Müller stendur einsamallur fyri øllum oddagreinunum, sigur Sosialurin. Eingin uttanfyristandandi hevur nakra ávirkan. Jan er á odda! Men er veruliga eingin aftanfyri?

Nógvir og fjølbroyttir pennar, sum skriva úr øllum herðashornum. Tað er tað, sum eyðkennir Sosialin. Sum ger Sosialin til eitt so frálíkt og fjølbroytt tíðindablað.

Maðurin aftanfyri, er fyrst og fremst Jan Müller. Og hann eigur uppibornan stóran heiður fyri at hava gjørt Sosialin til tað blað, hann er. Eingin ivi um tað.

Men so er tað tað politiska. Tað partapolitiska. Eitt eru tær mangan einsíðugu lýsingarnar av einum máli. Eitt annað eru tær manipulerandi samrøðurnar, Jan Müller tekur sær av. Tú veitst at endamálið ikki er upplýsing, men partapolitikkur, tá spurningarnir líkjast hesum: "Nú er Høgni Hoydal jú ein maður, sum er ódemokratiskur og diktatoriskur av lyndi. Hvat heldur tú um tað?"

Og so er tað oddagreinin í blaðnum. Ofta er hon saklig. Men viðhvørt verður hon latin upp í hendurnar á nøkrum javnaðarsoldatum sum ikki tora ikki at stíga út í ljósi sjálvir, men sum tann vegin fáa luft fyri sínum persónligu frustratiónum og innikleimdu aggressiónum. Og tað er mangan pínligt at lesa.

**Kendir menn**

Trupulleikin er, at hesir menn ikki eru heilt ókendir. Tí verður í politiska umhvøvinum altíð gitt um, hvør hevur skrivað hvat.

Tað skrivaði eg um hósdagin. Eg setti orð á illgrunan um, at oddagreinirnar um alt rokið á mentamálaráðnum kanska eru skrivaðar av einum limi í teirri setanarnevndini, sum Annlis Bjarkhamar hevur sett til viks.

Oddagreinin í Sosialinum svarar mær sama hósdag. Eg veit ikki hvør huldumaðurin er hesaferð, men hann sigur, at hesar oddagreinir ikki eru at samanbera við dulnevnd lesararøv, tí ábyrgdarblaðstjórin stendur fyri teimum. Altso Jan Müller. Og lagt verður afturat: "Tað er eingin uttanfyristandandi, sum sleppur at siga okkum, hvat vit skulu meina".

Hetta er ikki so. Flest øll vita, at menn, sum starvast aðrastaðni enn á Sosialinum, skriva nógvar av blaðsins oddagreinum.

Og tað er sera nógv sum bendir á, at tað nettupp er onkur "uttanfyristandandi", sum hevur gjørt av, hvat hevur staðið í oddagreinunum um hetta góða setanarmál.

Men ókey. Lat okkum siga, at tað er ábyrgdarblaðstjórin, sum stendur fyri øllum. At eingin dikterar honum nakað. Siga vit tað, hanga millum annað hesir spurningar í luftini:

**Ivamál**

Hvussu kundi Jan Müller, beint eftir at landsantikvarurin var settur og áðrenn nakar uttanfyristandandi (!) visti nakað sum helst um málið, gera tað greiðu niðurstøðu, at Annlis hevði borið seg skeivt at, og at embætismenninir høvdu borið seg rætt at? Var orsøkin ikki tann, at onkur, sum ikki starvast á Sosialinum, gjørdi av, hvat blaðið skuldi meina?

Mikudagin stendur soleiðis í oddagreinini: "Løgmaður umboðar landsins mest tignarliga sess, og bert hann kann steðga tí PROSESS, sum byrjaði við vrakaða føroyska umsøkjaranum og sum nú tykist halda fram millum embætismenninar í mentamálastýrinum". Tilsipingin er ikki at fara skeivur av. Veit Jan Müller nakað sum onnur ikki vita, tá hann setir fram eina so grova og ærumeiðandi samanbering? Og hvaðani veit hann tað?

"Tað er nú upp til løgmann at avgera lagnuna hjá føroyska umsøkjaranum og helst eisini lagnuna hjá embætisfólkum" sigur Jan Müller eisini í blaðnum mikudagin. Tað er skriva týsmorgunin. Hvaðani visti Jan Müller henda morgun, at størv hjá embætisfólkum eru í vanda?

"Øll tey, sum í greinum og brøvum royna at seta ljóskastaran á nakrar embætismenn og gera teir til syndabukk, gloyma heilt amatøraktiga leiklutin hjá teirra politiska arbeiðsgevara. Hesi fólk gera seg sek í einum møguligum justitsmorði," stendur eisini í blaðnum mikudagin. Hvussu kann Jan Müller vera so fullkomuliga vísur í, at tað ikki eru hesir embætismenn, men Bjarkhamar, sum hevur gjørt nakað skeivt?

Jan mælir eisini til, at løgmaður sker ígjøgnum til frama fyri embætismenninar, og "statuerar eitt eksempul". Veit Jan ikki, at løgmaður er hamrandi ógegnigur í hesum máli? Hví vil eitt óheft tíðindablað hava ein ógegnigan mann til at avgera eitt mál? Kann orsøkin vera, at blaðið hevur størri áhuga í tí sannlíka úrskurðinum hjá tí ógegniga Kallsberg, enn tað hevur í sannleikanum og rættvísinum?

Tann ógegnigi løgmaðurin er sambært Jan Müller enntá "tann einasti" sum nú kann bjarga starvsfólkapolitikkinum. Men tað passar ikki. Hetta er eitt púra upplagt mál fyri umboðsmannin. Fær hann øll skjøl í málinum, kann hann fáa sannleikan fram, og gera eina óhefta niðurstøðu. Hví vil Jan Müller ikki hava eina óhefta niðurstøðu?

**Tunga skyldan hjá Jan**

Tað hugsi eg nú, at hann vil kortini. Eg trúgvi ikki, at hann hevur skrivað hesar greinar.

Sannleikin er helst, at tað man kennast sum ein tung skylda hjá Jan Müller at leggja navn til alla ta eitrandi materiuna, sum teir dulnevndu javnaðarskribentarnir mangan kroysta úr sær. Menn, sum sita í sínum skýmaskotum og kasta eftir fólki, sum standa úti í ljósinum.

Tað er stórt spell, at Jan letur seg trýsta til hetta. Tí maðurin hevur gjøgnum nógv ára ótroyttiligt stríð skapt eitt frálíkt tíðindablað. Hann hevur betur uppiborið enn at standa sum tann steinurin, ið ryggleysir, sosialdemokratiskir huldumenn krógva seg aftanfyri.

**Eigur at fáa avleiðingar**

Í Oddagreinini mikudagin sigur Jan Müller(?) eisini, at Fregnir eisini hava prentað dulnevndar greinar. Tað er rætt. Og tað er skeivt. Fregnir dragast í so máta við sama trupulleika sum Sosialurin. Tað átti ikki at komið fyri. Tað havi eg fleiri ferðir sagt við blaðstjóran, Jonhard Mikkelsen.

At enda vil eg siga, at eg havi ikki ánilsi av, hvør hevur gjørt hvat í málinum um hesa góðu starvssetan. Men fyri ein uttanfyristandandi (!) sær tað út sum um, at onkur hevur misnýtt sítt vald. Og valdsmisnýtsla eigur ikki at vera góðtikin. Hetta málið eigur at fáa avleiðingar fyri tann ella teir ella tey, sum hava misnýtt valdið. Antin tað so er Annlis Bjarkhamar, ella tað eru embætismenninir, ellar tað er báðir partar. Hvør tað er, kann eg ikki vita.

Kanska eru allir pástandirnir, sum hava staðið í Sosialinum, púra rættir. Tað kann eg heldur ikki vita.

Líka so lítið sum Jan Müller kann vita tað.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Hvør var so boðskapurin hjá Magna Laksáfoss um økismenning?

**Jóannes Eidesgaard**



Týsdagin hevði Dimmalætting forvitnisliga grein av Tummasi í Dali um økismenning við heitinum "Suðuroyggin letur nógv meira, enn hon fær." Greinin bygdi á eina lýsing av peningarenslinum millum Suðuroynna og meginøkið, sum Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur hevur staðið fyri. Niðurstøðan hjá búskaparfrøðinum er greið: Suðuroyggin letur á leið 100 mió. kr. meira, enn hon fær árliga úr landskassan, sum so kunna brúkast aðrastaðni í landinum.

Alt í alt er greinin sera áhugaverd og upplýsandi. Og sjálvandi er tað áhugavert at vita, at suðuroyingar lata 100 mió. kr. meira, enn teir fáa úr landskassanum. Hetta gevur eina kenslu, har vit kenna okkum væl og als einki hava at smæðast fyri.

Men innast inni, so trúgvi eg, at flestu suðuroyingar høvdu hesa kenslu frammanundan. Tað hevur nú tíbetur ongantíð ligið til okkara, at vit ikki hava kent okkara týdning og okkara rætt í hesum samfelag. Men rætt er, at seinastu tíðina hava enntá landsstýrisfólk borið uppá mál, at íløgurnar, sum nú koma Suðuroynni til góðar, eru kanska meira enn tað, sum Suðuroyggin átti at fingið. Men hetta er rong tala, tí tá slíkt verður sagt, so má hyggjast eftir, hvussu nógvar íløgur mongu seinastu árini eru komnar til oynna.

Og hin vegin aftur, er tað rætt við øllum hesum "cost benefit" tosinum, tá tað snýr seg um at halda nakrar grundleggjandi tænastur við líka í landinum. Vit skulu hava skúlar, sjúkrahús, vegir, berghol og ferjur. Hetta eru bara partar av føroyska veruleikanum.

Sjálvur haldi eg ikki tað er rætt, at vit fara undir fleiri slíkar lýsingar sum henda, Magni Laksáfoss hevur gjørt, tí eg dugi ikki at síggja, at tað kann tæna nøkrum endamáli. Vit mugu ikki enda í tí støðu, at vit fara at seta økir í landinum upp móti hvørjum øðrum. Vit mugu ikki enda í tí støðu, at vit siga, at hetta økið gevur einki, og tí fær tað einki og so øvugt. Øll økir eiga sín náttúrliga part av ágóðunum.

**Boðskapurin**

Men tvey viðurskifti vóru serliga áhugaverd í nevndu grein. Tað fyrst var stabbamynd nr. 2, sum vísti miðalaldurin í ymisku økjunum. Henda vísti, at miðalaldurin í Suðuroynni var 38,5 ár, og er hetta lutfalsliga høgt samanborið við restina av landinum. Og orsøkin er sára einføld hon, at seinastu 25 árini, meðan miðnámsskúlin hevur verið í oynni, eru lutfalsliga nógv ung farin til víðari lestur, men av tí, at einki munandi av førleikakrevjandi størvum eru í Suðuroynni, so koma flestu teirra snøgt sagt ikki aftur.

Hetta er ein politiskur trupulleiki, sum nakað kann gerast við. Og tað er júst tað næsta í greinini, sum eg haldi er serliga áhugavert. Búskaparfrøðingurin mælir til, at landsstovnar og alment virksemi verður flutt til Suðuroynni. Hetta hevði skjótt og brátt bøtt um høga miðalaldurin, tí tá høvdu mong av teimum ungu flutt aftur í oynna.

Búskaparfrøðingurin sigur, at hetta er rætta leiðin sæð út frá einum búskaparfrøðiligum sjónarmiði, men eisini tí, at á henda hátt fæst mest nytta burtur úr besta tilfeinginum, sum landið eigur, nevniliga arbeiðsmegini. Harumframt sigur Magni Laksáfoss, at slík politisk stig at flyta landsstovnar og almenna umsiting til eitt nú Suðruoynna, vil gera, at kappingarførið hjá vinnuni í mun til útlendsku kappingarneytarnar ikki versnar, sum tað annars ger, um vit framhaldandi miðsavna alt í meginøkinum.

Harumframt er munandi lættari at fáa bæði ansing og bústað fyri rímiligan kostnað.

Fyri okkum politikkarar er boðskapurin greiður: Førleikakrevjandi størv út um landið, tað er vegurin fram.

Og hetta kunnu bert politkkararnir taka sær av. Tað verður ikki lætt og neyvan í fyrsta lagi serliga populert, men er viljin til staðar, so ber hetta til, meira enn so. Tá fyrstani kunnu vit tosa um, at nú er komin gongd á eina veruliga økismenning. Vegir, berghol, havnir, ferjur og ferðaseðlaprísir eru neyðugir karmar ella fortreytir - førleikakrevjandi størv er sjálv økismenningin.

# Svar til Sjúrð Skaale

**Jan Müller**
*blaðstjóri*



Í tveimum fylgjandi greinum leggur Sjúrður Skaale undirritaða undir líkt sum ólíkt. Hann skuldsetur undirritaða at geva dulnevndum lesarabrævskrivarum loyvi at misbrúka oddagreinsplássið í blaðnum. Henda niðurgerðing og hunddálkan av undirritaða talar sítt greiða mál og er á so lágum støði, at hon átti ikki at verið svarað. Men tá ákærin, dómarin og avrættarin Sjúrður Skaale ger hetta til eitt mál um mín persón og illtonkir ónavngivin fólk fyri at skriva skendskar og hatursfullar oddagreinir í Sosialinum má eg tala at og greiða fólki frá, hvat hetta málið í veruleikanum snýr seg um.

Málið snýr seg um starvssetan av nýggjum landsantikvari. Tað byrjaði alt við eini samrøðu í SVF, har landsstýriskvinnan Annlis Bjarkhamar gjørdi greitt, at hon hevði avgjørt at seta annan persón í starv enn setanarnevnd heilar tvær ferðir hevði mælt henni til. Hetta var fyri mong óhoyrt og ikki minst fyri tann føroyska umsøkjaran, sum fakliga setanarnevndin also hevði mett verða best egnaðan til starvið. Hann heldur seg vera fyri órættvísari og skeivari viðgerð av landsstýriskvinnuni og leggur málið fyri sítt egna felag, Magistarafelagið. Í samrøðu við SVF sama kvøld kemur landsstýriskvinnan fleiri ferðir at nevna Fróðskaparsetrið heldur enn Fornminnisavnið. Møguliga var hon mismælt men tað setti so eisini tankar í gongd hjá bæði oddagreinskrivara og øllum teimum mongu, sum starvast í tíðindaumhvørvin um, hvat møguliga kundi liggja aftan fyri alt hetta.

Úrslitið av hesum var ein góð og siðilig men samtíðis avgjørd oddagrein í Sosialinum hósdagin 6. februar undir heitinum "Ódámlig starvssetan". Har loyvir blaðið sær at spyrja, tá landsstýriskvinnan ikki fylgir innstillingini, hvussu almennir stovnar fara at virða almenna setanarpolitikkin, tá landsstýrið ikki ger tað. Niðurstøða blaðsins er, at tað skal ein ónátúrliga góð grund hjá Annlis Bjarkhamar til ikki at seta mannin, sum hevur virkað á stovninum í mong ár, hevur ferð eftir ferð verið settur landsfornfrøðingur, og sum setanarbólkurin við hægstu embætismonnum í Mentamálaráðnum hevur innstillað.

Landsstýriskvinnan er aftur í Degi og Viku mánakvøldið 10. februar Hon er opinskárað, og niðurstøðan er tann, at hon nú fer at hyggja nærri eftir leiklutinum og arbeiðinum hjá sínum embætisfólki í hesum máli. Annonseringin í Degi og Viku varð henda: "Landsstýriskvinnan í mentamálum ivast í, um hægstu embætisfólkini í Mentamálaráðnum eru nóg dugnalig. Hon er ikki nøgd við innstillingarnar, sum tey gjørdu, tá hon skuldi seta nýggjan landsantikvar. Og nú fer Annlis Bjarkhamar at eftirmeta støðuna í Mentamálaráðnum".

Fyri hyggjaran og eisini fyri undirritaða sum oddagreinsskrivara á Sosialinum gav hetta avgjørt stoff til eftirtanka. Nú skuldi ljóskastarin setast á teir embætismenn, sum ikki høvdu givið landsstýriskvinnuni ta innstilling, sum hon ynskti. Nú búgva vit í einum frælsum landi og má tað eisini vera loyvt oddagreinskrivara í Sosialinum at gera sínar analysur og niðurstøður, uttan at verða skýrdur fyri tað ringasta og illtonktur fyri alt ilt. Tað hevur undirritaði gjørt í hundraðtals fyri ikki at siga túsundtals oddagreinum gjøgnum árini, og tað frælsi skal eingin Sjúrður Skaale sleppa at forða honum í.

Í oddagrein okkara mikudagin 12. februar tvs. eftir at landsstýriskvinnan hevði verið alment úti í Sjónvarpinum og klárt latið koma til sjóndar, at nú stóðu embætismenninir fyri "tørni" róptu vit eitt hart varskó og gjørdu okkara niðurstøðu: at nú skuldu also embætismenn gerast syndabukkar og revsast fyri mistøk og ódugnaskap hjá landsstýriskvinnuni.

Eg fari at heita á øll tey, sum lesa hetta aftursvar um at steðga á her og gera sær púra greitt, hvat atfinningarnar og illtonkingin hjá Sjúrða Skaale fyrst og fremst snýr seg um. Maðurin hevur ikki verið varugur við, at landsstýriskvinnan hevur verið í sjónvarpinum sum nevnt longu mánadagin 10. februar og sjálv róð framundir, at málið og málsviðgerðin kundi fáa avleiðingar fyri hennara egnu embætismenn. Sum ein annar njósnari og ákæri, ið leitar eftir prógvum fyri síni heilaspunakendu konspiratiónsteori heldur Sjúrður Skaale seg loksins hava funnið prógvið fyri, at tað er embætisfólk í Mentamálastýrinum, sum antin skrivar oddagreinar ella lekur til blaðið. Tí – hvaðani visti blaðið, at landsstýriskvinnan ætlaði sær at fara í holt við sínar embætismenn annað enn internt úr Mentamálaráðnum!

Hóast internetið er uppfunnið og verður dúgliga brúkt av eitt nú Sjúrða Skaale, nú hann skrivar tað mesta av sínum niðurgerandi greinum móti eitt nú undirritaða úr Danmark, so bendir alt á, at maðurin ikki hevur hoyrt sína landsstýriskvinnu í SVF fara út alment við hesum, sum hann nú leggur Sosialin undir at hava fingið undirhonds vitan um. Hetta er langt úti.

Her hava vit ein ákæra, ein dómara og ein avrættara alt í sama persóni, ið hevur funnið sær nakrar fíggindar og sum heldur seg hava funnið prógvini, sum skulu brúkast til at fella dóm - men sum brádliga og so dyggiliga gerst offur fyri síni egnu hatsku samansvørjing.

Tað er álvarsligt fyri ikki at siga kriminelt at illtonkja onnur fyri at skriva nakað, ið tey ikki hava skrivað. Tað veit maðurin, og tí kemur hann út við hálvum illgitingum. Sjúrður Skaale hevur altíð verið talsmaður fyri navngivnum lesarabrøvum og var Sosialurin fyrsta blað, sum gjørdi hetta galdandi. Tá nú sami Sjúrður Skaale illtonkir og insinuerar, at ávísur persónur í setanarnevndini skal hava skrivað umrøddu oddagreinar, so avdúkar hann sín dupultmoral og sítt eftir øllum at døma feika lyndi. Um hann er so vísur í hesi síni søk, sum jú er kjarnan í báðum teimum óndsinnaðu greinunum, hví nevnir hann so ikki viðkoman di persón við navni! Er tað ikki feikt at lata slíka illtonking standa eftir, soleiðis at allir persónar í hesi setanarnevnd harvið eru undir illgruna og ákæru – fyri at leka ella skriva!

Nú Sjúrður Skaale alment roynir at seta líkheitstekin millum oddagreinar í Sosialinum og ávís embætisfólk í Mentamálastýrinum men ikki torir at nevna tey við navni, tí hann er feikur, kundi verið spurt, hvussu tætt er millum hann og landsstýriskvinnuna, tá hann fer út við slíkum skuldsetingum. Tosa tey saman. Gevur hann henni góð ráð, tá henni tørvar tey osfr. Tað er fyri mær fullkomiliga líkamikið, hvønn Sjúrður Skaale umgangs t, hvønn hann skrivar dulnevnd lesarabrøv fyri , hesuferð ella hasuferð, hvønn hann gongur ørindi fyri. Eg má bara ásanna, at hesin annars so fryntligi og skilagóði persónurin er ikki tann eg kendi. Hvør, ið hevur hamskift hann og hvør hevur fingið hann at gera øll ting so persónsfikserað og hvør hevur fingið hann at bryggja eina konspiratiónsteori fyri og aðra eftir, tað er mær og mínum arbeiði sum blaðstjóri á Sosialinum óviðkomandi, og eg veit tað heldur ikki. Tí fari eg heldur ikki at koma við nøkrum illgruna, tí slíkur er skitið og ómenniskjansligt vápn.

Skrivingin hjá Sjúrða Skaale er tíanverri per-sónlig og tendentiøs. Hon er eyðkend av, at hann sær seg bæði sum ákæra, dómara og avrættara. Slíkir persónar eru vandamiklar fyri seg sjálvan og fyri demokratiið.